# Almennur fundur um støðuna í útoyggjunum

**Í dag dag verður almennur fundur í Havn um vinnumøguleikarnir í útoyggjunum, har fleiri fyrilestrar eru á skránni**



*Svínoy er ein av teimum útoyggjunum, sum verða avtoftaðar, verða ikki tiltøk sett í verk heilt skjótt. Her er lendingin í Svínoy. Góð samferðsla er ein fortreyt fyri livilíkindum á útoyggj. Spuringurin er so um gamli másin livir upp til heitið um góðar samferðslumøguleikar*

ÚTOYGGJAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vinnumøguleikar í útoyggj!

Hetta er evnið, sum er til viðgerðar á almennum fundi, sum verður á Hotel Hafnia í allan dag.

Tað er Útoyggjafelagið, sum skipar fyri evnisdegi um vinnumøguleikar í útoyggj og tiltakið byrjar klokkan 10 í morgun og ætlanin er at enda klokkan 15 ídag.

Á fundinum verða bæði framløgur og kjak.

Ætlanin við framløgunum er at lýsa umstøðurnar fyri vinnu, royndir við vinnu og treytir fyri, at vinnuframtøk kunnu eydnast.

– Útoyggjafelagið vónar við hesum tiltaki, at fáa lýst umstøðurnar fyri vinnu á útoyggjunum og at fáa greiði á hvat politiski myndugleikin er sinnaður at gera, sigur felagið í eintíðindaskrivi um tiltakið.

Felagið sigur, at evnisdagurin er ætlaður sum kunning, hugkveiking og grundarlag fyri framhaldandi arbeiði, so at verulig tiltøk verða sett í verk.

Klokkan 10 í morgun fer Óla Jákup úr Dímun, formaður í Útoyggjafelagnum, at bjóða øllum væl komnum. Klokkan 10.05 fer Olga Biskopstø, samskipari í Útoyggjafelagnum, at vísa ymisk hagtøl um viðurskiftini í útoyggjunum. Klokkan eitt korter til ellivu fer Bjarni Jacobsen av smoltstøðini í Svínoy at greiða frá, hvussu tað er at hava vinnu í útoyggj. Kl 10.30 fer Gunnar Bjarnason at tosa um landbúnað. Eitt nú fer hann at greiða frá fyritreytum, ella vantandi fyritreytum, fyri burðardyggum landbúnaði á útoyggj.

Aftaná fer eitt umboð fyuri menningarstovuna at røða um neyðugar fyritreytir og førleikar fyri at reka vinnu og síðani fer Granskingardepilin fyri Økismenning at siga eitt sindur um ástøði innan økismenning, eitt nú um trivnað og íverksetan og um sosialan kapital. Granskingardepilin fer eisini at geva eitt boð uppá, hvat er minsta treytin fyri trivnaði og framgongd. Klokkan eitt korter til 12 verða spurningar og kjak.

### Politikarar sleppa framat

Eftir døgverða sleppa politikararnir framat.

Klokkan 13, fer Jóannes Eidesgaard, løgmaður, at greiða frá ætlanum hjá samgonguni um at menna av útjaðaran og útoyggjarnar. Eitt korter seinni, fer Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum, at greiða frá ætlanum sínum í sambandi við útoyggjamál og klokkan hálvgum tvey fer Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, at greiða frá ætlanum innan samferðslu, samskifti og vinnuábótum á útoyggjunum.

Klokkan trýkorter til tvey verða spurningar og kjak og síðani verður tikið samanum.

# Marknaður fyri fóður verdur hálva milliard

**Tað sigst at umleið helvtin av laksafóðrinum til føroyska alivinnu kemur frá Havsbrún meðan hin helvtin kemur frá Ewos og Skretting - tilsamans keypa alararnir fóður fyri umleið eina hálva milliard krónur um árið**

[LAKSAFÓÐUR]
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Eitt er útflutningur og útflutningsvirði, eitt annað tann innflutningur ið ofta krevst í sama høpi. Hjá alivinnuni er fóður nógv tann størsti innflutnings posturin og tað samlaða innkeypið av fóðri liggur um hálvu milliardina. Tað eru tríggir aktørar ið kappast um at veita vøruna: okkara egni føroyski framleiðari Havsbrún, ið sigst sita á umleið helvtini av marknaðinum, og so teir báðir norsku veitararnir Ewos og Skretting.

Føroysk alibrúk keyptu í 2003, sambært ráðgevingar fyritøkuna Avrik, fyri tilsamans 74 000 tons av fóðri. Ganga vit út frá at marknaðarparturin hjá Havsbrún liggur um 50 prosent meðan restin av fóðrinum er innflutt úr Noreg, og siga vit at miðal prísurin fyri fóður liggur um 6,50 so merkir hetta at influtningurin av fóðri til alivinnuna lá um 240 milliónir krónur í fjør; út frá hesum hevur sølan av fóðri hja Havsbrún mótsvarað somu upphædd. Við øðrum orðum er marknaðurin fyri fóður til føroyska alivinnu verdur 480 milliónir krónur um árið.

# Metsøla av óvirkaðum fiski

**Triðingur av øllum feskum fiski og nærum tveir triðingar av hýsuni fara óvirkað av landinum**

FISKIVINNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Føroyskur fiskur verður sum ongantíð áður seldur óvirkaður av landinum*

Hagstovan sigur í tíðindaskrivi, at meira enn triðingur av veiðuni hjá feskfiskaflotanum í fjør varð seldur útlendskum keyparum sum óvirkaður fiskur

Tað er ongan tíð áður komið fyri, at ein so lítil partur av føroyskum fiski er endaður á føroyskum flekiborðum.

Sambært Hagstovuni, so førdu føroysku feskfiskaskipini umleið 105.000 tons av toski, hýsu og upsa til landið. Góð 35.000 tons av hesum vórðu antin seld uttanlands ella útflutt óvirkað. Ikki síðani 1996 hava útlendsku avreiðingar verið í nær námind hesum talinum. Ta ferðina við 21.000 tonsum ella 32%.

Tað er serliga hýsan, sum lítið verður gjørt við í Føroyum. Nærum 60% av hýsuni – ella duput so nógv sum í fjør – fer óvirkað av landinum.

Sambært Hagstovuni, so er tað fyrst og fremst ein hægri prísur enn hann, ið fæst við at virka fiskin her heima, sum fær føroysku virkini til antin sjálvi at selja fiskin óvirkaðan, ella snøgt sagt bara lata skipini avreiða uttanlands.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Torkil Skála 60 ár



Í dag, 12. mars, fyllir Torkil Skála í Havn 60 ár.

Fyri tíggju árum síðan, til hansara 50 ára føðingardag, varð hendan yrking gjørd:

*Føddur varð hann sjálvan*
*grækarismessudag,*
*spentar tíðir vóru kríggj*
*við sama lag.*
*Gleðin ongan enda fann*
*um tann nýggja havnar-*
*mann,*
*og við tjøldrunum hann*
*var í ferðalag"*

Torkil er elsti sonur hjá Honnu, f. Thorkildshøj, av Nesi og Óla Christian Skála, keypmann í Havn.

Eftir lokið realprógv fór hann á studentaskúla og tók studentsprógv í Hoydølum í 1963.

Síðan var hann vikarur við Sankta Frans Skúla í tvey ár.

Torkil var sjómaður í eina tíð, hann var við línubátunum Mai og Oyrarsker.

So lá leiðin til Danmarkar, har hann tók lærarprógv frá Esbjerg Seminarium í 1971. Heimafturkomin fekk hann starv á Venjingarskúlanum í Havn, har hann var lærari til 1977.

Síðan Eysturskúlin varð liðugur í 1977, hevur Torkil starvast sum lærari har - eitt arbeiðspláss, sum hann hevur verið ómetaliga glaður fyri.

Hann hevur verið á ymiskum skeiðum á Fróðskaparsetri Føroya innan sítt starvsøki, serliga innan søgu og undirvísingarlæru. Hann var limur í Tórshavnar Skúlaráð frá 1976-84.

Innan ítróttin hevur fótbólturin havt hansara stóra áhuga. Hann var formaður í HB eitt tíðarskeið og er enn í dag ein av trúgvu gomlu HB-stuðlunum.

Hann var í nøkur ár ein virkin bridgespælari, var formaður í Nýggja Bridgefelagnum, men í løtuni er hann hvílandi limur.

Sangur hevur eisini havt hansara stóra áhuga, hann hevur sungið sum tenorur í Tórshavnar Manskóri í tíggju góð og gevandi ár.

Torkil er giftur við Esther, f. Justinussen, ættað úr Leirvík, og eiga tey tvey børn: Eirik, sum býr á Argjum, og Hervør, sum býr í Rødekro í Danmark. Eisini eigur hann tvær fittar abbadøtur, Mariu og Ester.

Føðingardagin er Torkil burturstaddur.

## Móttøka

Við tað at eg, aftaná 36 ára starvstíð
hjá P/f Statoil Føroyar, gavst tann 1. mars 2004,
verður móttøka í heiminum hjá mær
fyri áhugaðum tann 13. mars frá kl. 14 til 17.

*Vinarligast*
**Kári**

### Gospel á Margarinfabrikkini

Leygarkvøldið verður konsert á Margarinfabrikkini við bólkunum, Credo úr Klaksvík, Reach úr Havn og Direct Level av Skálafjørðinum.

Konsertin er til frama fyri Herbergið hjá Frelsunarherinum. Byrjað verður klokkan klokkan 21.30 og heldur fram til 0.30. Kostnaðurin er 30.00 krónur.

### Dagurin

**12. mars, Grækarismessa**. Til minnis um tann tiltikna pávan, sum fekk navnið Gregorius hin Mikli. Hann doyði 12. mars ár 604. Hann skipaði fyri mongum tiltøkum og gav boð og leiðbeiningar um lívið í kirkjuliðnum og hjá tí einstaka. Millum annað sigst hann at hava fingið í lag tann sonevnda *gregorianska kirkjusongin*, sum teir kønu halda, at tey føroysku kingoløgini eru komin av.

Upprunaliga grikska navnið merkir *hin árvakni*.

Grækarismessa er ein av teimum døgunum, sum boða várið.

Tey gomlu plagdu ofta at kvøða hetta ørindið:

*Grækarismessa hvítaskegg,*
*hann lokkar børnini út um vegg,*
*men Bartolomeus vetursins vin*
*hann koyrir børnini inn til eldin ígen.*

Um hetta mundið kemur flytifuglurin tjaldrið aftur, og av mongum verður grækarismessa eisini rópt *tjaldursdagurin*. Grækarismessuhald at fagna tjaldrinum er íkomið í nýggjari tíð.

# Til mína elskaðu ommu



Fyrst vil eg siga tær takk fyri, at tú bíðaði við at fara til Harran, til eftir vit vóru komin upp at vitja teg í heyst, tá tú vart blivin so sera sjúk. Tá vit vóru heima í summar, vart tú nakað veikari enn tú plagdi, men tað vardi meg ikki, at tú skuldi blíva tikin heim so skjótt.

Omma góða, eg eigi nógv góð minnir um teg, ið eru góð at hava, sjálvt um eg nógv heldur vildi, at tú enn vart ímillum okkum.

Nú stendur tú ikki í vindeyganum har uppi, tá man fer avstað ella kemur aftur. Tú hevur altíð verið sera trúføst at fylgt við, hvat vit hava tykist við.

Hóast eg havi búð í Danmark tey seinastu 5 árini, hevur sambandið okkara millum verið gott. Tú vart tann trúfastasta av okkum at ringja. Um vit júst høvdu verið heima, ringdi tú oftari, tí tú saknaði okkum. Og var tað stutt tíð til vit komu heim, ringdi tú eisini oftari, tí tú gleddi teg at síggja okkum aftur.

Tað er so nógv eg kann taka fram um teg góða omma, so eg vil at avmarka meg.

Røsk vart tú til hendurnar, bæði at binda og seyma, og nógv eru pløggini, tú hevur bundið og seyma uppá okkum ommubørnini, møguliga serliga meg, tí eg var tann fyrsta ommudótturin. Eisini havi eg varhugan av, at tú helt tað var serliga spennandi at seyma diddiklæðir, so tað nýtti eg bara gott av, tí eg var einasta ommudótturin í 6 ár.

Eftir at vit hava fingið Christinu, tók eg, tá vit komu heim at ferðast, øll tey klæðini hon hevði fingið, síðani vit seinast vóru heima. Hetta mest, tí at eg visti, at tær dámdi væl at síggja nýggj klæðir, eins og tær dámdi væl at børn vóru pent ílætin.

Eisini dámdi tær væl at royna nýggjar matuppskriftir. Tey seinastu árini gjørdi tú ikki so nógv við at baka sjálv. Men tú visti, at eg hevði hug til tað, so fanst tú onkra spennandi uppskrift, spurdi tú, um eg ikki skuldi royna hesa. Tá kakan so var bakað ella døgurðin gjørdur, ringdu vit niðan fyri at vita, um tú ikki hevði hug at koma oman at smakka – og sjálvandi hevði tú tað.

Altíð hevði tú góðan hug at koma við í bilin, um eg fór onkrastaðni. Serliga var tað, tá leiðin gekk til Havnar, tí so kundi tú vitja Malfrid ommididd ella fastur og dreingirnar, ímeðan eg gjørdi ørindir.

Tú hevur eisini fleiri ferðir verið við eftir okkum, tá vit eru komin heim í feriu. Ja, tú offraði teg, sjálvt um heilsan hjá tær hevði betri av, at tú hvíldi teg.

Tín 85 ára føðingardag, høvdu vit stóra gleði at halda saman við tær, tá tú og babba komu til Keypmannahavnar at vitja okkum. Tú hevði ikki mót uppá at halda nakran føðingardag, so eg haldi, at tað var óført, at tú hættaði tær at koma til Kepmannahavnar, sjálvt um tú mangan hevði sagt, at tú ongantíð ætlaði tær aftur á flog við tín góða vilja – man hevur eina meining inntil man hevur fingið eina aðra.

Hetta eru alt upplivingar, sum fáa meg at hugsa, hvussu nógv eg sakni teg.

Omma, tú hevur altíð verið har fyri meg. Eg havi kunna deilt bæði sorgir og gleðir við tær, tú hevur styðja meg og vegleitt meg. Takk fyri tað. Tín verimáti, hevur lært meg nógv.

Tað var ikki leingi, at tú fekk loyvi at hoyra, at Christina dugir at siga "langomma". Mítt ynski hevði verið, at hon kom at uppliva teg longri, men soleiðis vildi ikki til. Nú fer hon bert at minnast teg á tann hátt, sum vit koma at fortelja henni um teg. Tað er nógv gott at fortelja, so hon vil eisini fáa eitt positivt minni um teg góða omma.

Saknurin er stórur, men tað er trygt at vita, at tú ert komin til ein betri stað, har ongin pína er. So eg vil ikki siga tær farvæl við hesum, men heldur »vit síggjast«.

**Súsanna**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin